Tónleikur hjá Lenu Anderssen verður givin út í Danmark í september mánaði

Lena verður givin út í Danmark

Í september mánaði verður fløga við Lenu Anderssen givin út í Danmark. Hetta er ein liður í arbeiðnum hjá henni at vinna fram uttanlands

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Seinastu vikurnar hevur Lena Anderssen havt fleiri framførslur í Danmark, og í kvøld skal hon spæla fyri sløkum 8000 fólkum í Horsens, har hon hitar upp fyri bretska stjørnubólkin Roxy Music.

Í september mánaði kunnu danir eisini keypa tónleik hjá Lenu á fløgu, tí tá kemur fyrsta útgávan hjá Lenu Anderssen út niðri. Framførslurnar og fløgu-útgávan er ein liður í arbeiðnum hjá Lenu at vinna fram uttanlands.

Enski umboðsmaðurin hjá Lenu, Richard Ogden, hevur seinastu mánaðirnar arbeitt við at fáa Lenu fram í Norðurlondum, og hetta arbeiðið er av álvara farið at geva úrslit.

Á fløguni hjá Lenu, sum kemur út í Danmark, verða lutvíst sangir, sum komu út á seinastu útgávu hennara í Føroyum. Afturat teimum sangunum verða eisini aðrir sangir hjá Lenu.

Sweet - somewhere in The Faroe Islands

FESTIVALUR
dagfinn@sosialurin.fo

Á heimasíðuni hjá The Sweet er nú staðfest í ferðaætlanini, at bólkurin vitjar Jóansøkufestivalin. Og tað er ikki ein og hvør, ið spælir við bólkinum, men garvaðir tónleikarar, ið hava spælt við teimum stóru rocknøvnunum

Á heimasíðuni hjá The Sweet verður nú staðfest í tournéætlanini, at á jóansøku vitjar bólkurin í Føroyum. Ikki er neyvt lýst, men eitt sindur skemtiligt er, at sagt verður bert Somewhere in The Faroe Islands.

Tónleikararnir í AS Sweet, sum Andy Scott er á odda fyri, eru royndir tónleikarar, sum hava spælt við teimum bestu. Nevnast kann, at hesir garvaðu tónleikarar hava spælt við t.d. Nazareth, Rainbow og George Harrisson.

Forsølan til Jóansøku-festivalin er byrjað og fáast atgongumerkini fyri 165 krónur í forsølu og fyri 200 krónur við dyrnar.

G! Festivalurin yvirbjóðar MjúS

Nú bjóðar G! verulig av, Jón Tyril fyriskipari váttar, at størsta tónleikasamstarvið í Vágoynni nakrantíð "Vágaverk" við Sámal Ravnsfjall og Joan Jakku Guttesen verður á G!

MjúS kunngjørdu í vikuni, at eitt av størstu tónleikasamstørvunum í Vágunum skal spæla við bálið. Talan var um bólkin Villmenn, sum er frálíkt samstarv millum prix veteranarnar Holgar og Finnur Joen. Holgar og Finnur hava verið umrøddir, sum størsta tónleikasamstarv síðan Vágaverk. Nú svarar G! aftur við at bjóða tað veruliga vágakremið.

-Nud

COõ õ CÊOLVR J F_jr dpå rĆ rĜ fctsp dpå, Dcpå_qr å DÑpmws k

Ifs^kaf qĖkibfhro
* ifs^kaf pr j j ^o

Dbs pr j j ^ofkr j iťs l d oĜq j r÷
C^o ć qĖkibfh^cbpqfs^i

Fßroyskur t·nleikur hevur aldri veriĢ so fjßlbroyttur, sum beint nť. Og t·nleikurin, bÞĢi fßroyskur og ťtlendskur, fer at seta s²n st·ra d§m § summariĢ ² §r.

Fyrst og fremst eru taĢ t·nleika-festivalarnir. Teir eru eitt fr§l²kt hßvi at vitja stßĢ, tť sj§ldan fÞrt ² lag at vitja. At hitta f·lk. At nj·ta n§ttťruna. Og samstundis hoyra fr§l²kan t·nleik.

TaĢ byrjar longu § j·ansßku viĢ teimum nĤggjum festivalunum heima § Sandi og § Tvßroyri. Seinni koma so G! Festivalurin ² Gßtu og Summarfestivalurin ² Klaksv²k.

Men taĢ er ikki bara § festivalunum, at summariĢ fer at swinga. Summar-t·nar og Listastevnan seta eisini l²v ² t·narnar. Ikki bara ² Havn, men kring alt landiĢ. Og taĢ er ein h·pur av ßĢrum, smÞrri tiltßkum.

Um tÞr d§mar rock, jazz ella f·lka-t·nleik ï n·g mikiĢ er at fara til.

Sit ikki heima. Mßt upp, har t·nleikurin livir.

Gev t²num summari litir. L²v. Og rťtmu.

Ferðaráð Føroya

Prßrolv^o Hrkkťkd^opqls^ ć QsĐolvoť qbi÷ 04 /1 5-) Prßrolv^o Hrkkťkd^opqls^ ť Sćdť qbi÷ 04 10 1/
P^kalv^o Hrkkťkd^opqls^ qbi÷ 03 .5 03) Hrkkťkd^opqls^k ť QĖope^sk qbi÷ 0. 24 55) Hrkkťkd^opqls^k ť P^iq^kd^oć qbi÷ 11 61 16)
Hrkkťkd^opqls^k ť Crdi^*oßť qbi÷ 11 15 3-)Sćd^ Hrkkťkd^opqls^ qbi÷ 00 01 22) Kloßlv^ Hrkkťkd^opqls^ qbi÷ 12 36 06

t t t÷sfpfq*c^olbfpi^kap÷`l j